# Góðkenning av vælveruøkinum við svimjihøllina í Leirvík

| Navn á svimjihøll við góðkenning: | |
|---|---|
| **Svimjihøllin í Leirvík** | |
| Bústaður hjá svimjihøll: | |
| Samognarbøur 4, 520 Leirvík | |
| Matr. nr.: | |
| 422a | |
| Eigari: | Eftirlitsmyndugleiki: |
| Eysturkommuna | Umhvørvisstovan |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 25/29321 | 14-09-2026 |

Argir, 14. september 2026

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

Rakul Mortensen, málsviðgeri

**1. GÓÐKENNING OG HEIMILDIR ....... 3**

**2. UMSÓKNIN ....... 3**

**3. VIRKSEMI OG VIÐURSKIFTI ....... 3**

3.1. UM VÆLVERUØKIÐ ....... 3

**4. GÓÐKENNINGARTREYTIR ....... 4**

4.1. ALMENNAR TREYTIR ....... 4
4.2. TREYTIR TIL VATNGÓÐSKUNA ....... 4
4.3. RAKSTUR AV VÆLVERUØKINUM ....... 7
4.4. INNRÆTTING AV SKIFTINGARRÚMUM, BRÚSURÚMUM, GONGDUM OG HYLJUM ....... 8
4.5. INNRÆTTING OG RAKSTUR AV REINSISKIPANUM ....... 8
4.6. KEMIKALII – GOYMSLA OG NÝTSLA ....... 10
4.7. REINGERÐARKRØV ....... 10
4.8. BURTURKAST ....... 11

**5. FYLGISKJAL 1: VÆLVERUØKIÐ VIÐ SVIMJIHØLLINA Í LEIRVÍK ....... 12**

# 1. Góðkenning og heimildir

Henda góðkenning av vælveruøkinum við svimjihøllina í Leirvík, Samognarbøur 4, 520 Leirvík, er givin við heimild í § 13, stk. 1, og § 31, stk. 2, í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, við seinni broytingum.

Í góðkenningini verða settar treytir fyri rakstrinum av vælveruøkinum, sum skulu tryggja, at heilsufrøðiligu viðurskiftini eru nøktandi, og at reinsiskipan og vatngóðska lúka galdandi krøv.

Vatngóðskan skal lúka krøvini í reglugerð um góðskukrøv til svimjihyljar[1]. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur, vegna Umhvørvisstovuna, eitt árligt eftirlit við hyljunum í svimjihøllini.

Eysturkommuna eigur og rekur svimjihøllina í Leirvík. Sambært § 31, stk. 2, í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur hevur Umhvørvisstovan eftirlitið við virksemi, sum kommunur eiga ella reka.

# 2. Umsóknin

Hin 21. mai 2025 sendi Eysturkommuna Umhvørvisstovuni umsókn um góðkenning av nýggja vælveruøkinum við svimjihøllina í Leirvík. Saman við umsóknini hevur Umhvørvisstovan móttikið tekningar av reinsiskipanunum umframt eina yvirlitsmynd av vælveruøkinum og lýsingar av virkseminum. Móttikna tilfarið hevur verið grundarlagið undir viðgerðini av umsóknini.

Sambært umsóknini verður eitt vælveruøki bygt sum partur av verandi svimjihøll. Í hesum sambandi verður eitt nýtt tøknirúm bygt undir jørð, sum skal hýsa reinsiskipanini til vælveruøkið.

Atkoman til vælveruøkið verður frá verandi svimjihøll, og verandi skiftingarrúm verða nýtt.

Umhvørvisstovan var á staðnum tann 7. november 2025 fyri at hyggja at nýggja vælveruøkinum og teimum teknisku skipanunum.

Í viðgerðini av umsóknini er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn dagfest 21. mai 2025
- Vitjan á vælveruøkinum í Leirvík tann 7. november 2025
- Reglugerð um góðskukrøv til svimjihyljar, Umhvørvisstovan, 2016
- Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020
- Vejledning om godkendelse af svømmebade, Miljøstyrelsen, 2017
- Norm for Svømmebadsanlæg (DS 477), Dansk Standard, 2013

# 3. Virksemi og viðurskifti

## 3.1. Um vælveruøkið

Vælveruøkið er knýtt at verandi svimjihøllini í Leirvík.

Í vælveruøkinum eru tveir hitapottar, ein kaldur pottur, dampbað og sauna.

[1] Reglugerð um góðskukrøv til svimjihyljar, Umhvørvisstovan 2016

Í hesi góðkenning verður orðið *hyljar* nýtt sum felagsheiti fyri hitapottarnar og kalda pottin. Kaldi potturin hevur tó støðuga gjøgnumrenning av nýggjum vatni og er ikki knýttur at somu reinsiskipan sum hitapottarnir. Treytir, sum viðvíkja recirkulatión, filtrering, litroynd og kemiskari viðgerð av vatninum, herundir krøv til frítt og bundið klor, eru tí einans galdandi fyri hitapottarnar.

Reinsiskipanin, sum henda góðkenning fevnir um, er ein sjálvstøðug skipan, ið bert tænir vælveruøkinum.

Nærri lýsing av vælveruøkinum er í fylgiskjali 1.

# 4. Góðkenningartreytir

## 4.1. Almennar treytir

4.1.1. Eitt avrit av hesi góðkenning skal altíð verða til staðar í svimjihøllini, og ábyrgdarfólk skulu kenna til innihaldið í góðkenningini.

4.1.2. Reinsiskipanin skal vera gjørd og rikin sum lýst í umsóknini.

4.1.3. Hyljarnir og teknisku skipanirnar til hyljarnar skulu rekast í samsvari við treytirnar í hesi góðkenning.

4.1.4. Um broytingar verða gjørdar við hyljunum, reinsiskipanunum ella kemikaliiskipanunum, skal Umhvørvisstovan fáa boð um hetta, áðrenn broytingarnar verða framdar. Umhvørvisstovan metir, út frá givnu upplýsingunum, um broytingarnar krevja nýggja góðkenning.

4.1.5. Um nýggj reinsiskipan verður sett upp, ella stórar broytingar verða gjørdar í mun til núverandi skipan, skulu broytingarnar gerast í samsvari við galdandi danska normin, sum í løtuni er DS 477, *Norm for Svømmebadsanlæg*, 2. útgáva frá 13. mars 2013.

4.1.6. Umhvørvisstovan kann krevja, at góðkenningin verður endurskoðað, um afturvendandi trupulleikar eru við reinførinum ella vatngóðskuni.

## 4.2. Treytir til vatngóðskuna

4.2.1. Vatnið, ið verður nýtt til at fylla hyljarnar við, skal lúka treytirnar, sum eru ásettar fyri drekkivatn[2].

4.2.2. Góðskan á vatninum skal til eina og hvørja tíð lúka krøvini í talvuni niðanfyri. Krøvini í talvuni til pH, frítt klor, bundið klor og trihalometanir eru bert galdandi fyri hitapottarnar.

| Parametur | Eind | Í minsta lagi | Í mesta lagi | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| Klárleiki | | | | Vatnið skal vera klárt |
| pH | | 6,8* | 7,6 | Áhaldandi mátingar |
| Frítt klor | | | | Áhaldandi mátingar |

[2] Kunngerð nr. 127 frá 22. november 2013 um veiting av drekkivatni.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| ≤ 34 °C<br>> 34 °C | mg/l<br>mg/l | 0,4<br>1,0 | 1,5<br>2,0 | |
| Bundið klor | mg/l | | 0,5 | So lágt sum gjørligt |
| Trihalometanir<br>≤ 34 °C<br>> 34 °C | <br>µg THM/l<br>µg THM/l | | <br>25<br>50 | So lágt sum gjørligt |
| Kimtal við 37 °C | pr. 100 ml | | 500 | Við kimtali hægri enn 500 pr. 100 ml verður umsýni tikið. |
| Escherichia coli | pr. 100 ml | | < 1 | Í sambandi við umsýnið, tá kimtalið er hægri enn 500/100ml, verður kannað, um hesar bakteriur eru til staðar. |
| Pseudomonas-bakteriur | pr. 100 ml | | < 1 | |

*Av heilsuávum er 6,8 eitt absolutt minsta virði. Hetta merkir, at sjálvt eitt lítið sindur lægri virði enn 6,8 ikki kann góðtakast, heldur ikki sum løtuvirði.

### *Mátingar*

4.2.3. Innihaldið av fríum klori, bundnum klori, og pH í hitapottunum skal kannast fleiri ferðir um dagin. Fyrsta mátingin skal gerast manuelt beint áðrenn upplatingartíð fyri at kanna, um tey automatisku mátitólini virka til fulnar. Aftaná fyrstu mátingina skal vatnið javnan kannast, tó við í mesta lagi 6 tíma millumbili fram til afturlating. Hetta kann gerast manuelt ella við teimum automatisku mátitólunum.

4.2.4. Hitin í hyljunum skal mátast dagliga, í minsta lagi við upplatingartíð og helst leypandi ígjøgnum dagin.

4.2.5. Tryggjast skal, at mátitólini altíð eru í góðum standi og virka til fulnar.

### *Skrásetingar*

4.2.6. Ábyrgdarhavarin fyri hyljunum skal føra útgreinaða logbók.

4.2.7. Í logbókini skulu klárleiki á vatninum og, fyri hitapottarnar, pH, frítt klor og bundið klor skrásetast eftir hvørja kanning ella avlesing.

4.2.8. Í logbókini skulu tal av vitjandi, rakstrartrupulleikar og klagur frá vitjandi skrásetast.

4.2.9. Í logbókini skal skrásetast, nær filtrini verða returskolað, nær hyljarnir verða reinsaðir, og nær annað viðkomandi viðlíkahald verður framt.

4.2.10. Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi tvey ár og skulu til eina og hvørja tíð kunna vísast Umhvørvisstovuni.

### *Sýnir til kanningar*

4.2.11. Í minsta lagi 6 ferðir um árið skulu sýnir takast av baðvatninum í øllum pottum og kannast fyri kimtal við 37 °C. Í sambandi við sýnistøkuna í hitapottunum skulu pH, frítt klor og bundið klor mátast á staðnum og skrásetast í logbókini.

4.2.12. Um kimtalið er hægri enn 500 kim pr. 100 ml, skal eitt nýtt sýni kannast fyri kimtal við 37 °C, *Escherichia coli* og *Pseudomonas* bakteriur. Hetta skal gerast skjótast gjørligt.

4.2.13. Í minsta lagi eina ferð hvørt hálvár skulu kanningar gerast fyri innihaldið av trihalometanum í hitapottunum.

4.2.14. Sýni, sum verða send til greining, skulu kannast av óheftari starvsstovu, sum hevur førleika til at gera arbeiðið.

4.2.15. Umhvørvisstovan tilskilar sær rættin at broyta sýnistøkuparametrar og sýnistøkutíttleika í treytum 4.2.2, 4.2.11, 4.2.12 og 4.2.13, um kanningar av vatngóðskuni vísa tørv á eyka eftirliti.

4.2.16. Um kanningar vísa ónøktandi úrslit, skal ábyrgdarhavarin fyri svimjihøllina seta neyðug tiltøk í verk beinanvegin.

4.2.17. Eigarin av svimjihøllini ber sjálvur útreiðslurnar, sum eru knýttar at sýnistøku og greining.

### *Eftirlit*

4.2.18. Eina ferð um árið skal eftirlit verða framt við svimjihøllini. Umhvørvisstovan hevur valt at lata Heilsufrøðiligu starvsstovuni hesa uppgávu, men hevur framvegis ábyrgd av, at eftirlitið verður framt.

4.2.19. Á eftirlitsvitjanini verður kannað, um viðurskiftini eru nøktandi. Hetta inniber m.a., at pH og innihaldið av fríum og bundnum klori í hitapottunum verða kannað á staðnum. Eisini verða sýni av vatninum tikin við á starvsstovuna, har turbiditetur og kimtal verða kannað. Trihalometanir verða kannaðar í sýnum frá hitapottunum.

4.2.20. Heilsufrøðiliga starvsstovan ger eina eftirlitsfrágreiðing og sendir eitt avrit av henni, saman við úrslitum frá teimum sýnum, sum eru tikin gjøgnum árið, til Umhvørvisstovuna og svimjihøllina í Leirvík. Síðani setur Umhvørvisstovan seg í samband við svimjihøllina fyri at gjøgnumganga frágreiðingina og úrslitini frá sýnistøkunum.

4.2.21. Um viðurskifti verða staðfest, sum kunnu vera til vanda fyri heilsuna, kann Umhvørvisstovan geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk.

### *Baðing bannað*

4.2.22. Vitjandi skulu fara úr tí ella teimum pottum, har vatngóðskan liggur uttan fyri tey absoluttu markvirðini, sum eru hesi:

- pH er undir 6,8 ella yvir 8,0.

- Innihaldið av fríum klori fer niður um 60 % av minst loyvda innihaldinum ella 100 % upp um mest loyvda innihaldinum.
- Innihaldið av bundnum klori er yvir 1,0 mg/l.
- Innihaldið av kimtali við 37 °C er hægri enn 10.000 kim/100 ml.
- Innihaldið av *Escherichia coli* og *Pseudomonas* bakterium er hægri enn 10 bakteriur/100 ml.
- Serligar umstøður taka seg upp, sum kunnu seta heilsuna hjá teimum baðandi í vanda, eitt nú óhapp við dálking av skarni ella spýggju.
- Illgruni er um, at vatnið hevur týðandi ampa á heilsuna hjá teimum baðandi, eitt nú eygnairritatión.

## 4.3. Rakstur av vælveruøkinum

4.3.1. Í minsta lagi eitt fólk skal útnevnast at hava høvuðsábyrgd av rakstri og røkt av reinsiskipanunum. Viðkomandi skal hava útbúgving, sum er góðkend av Umhvørvisstovuni, fyri at kunna hava hesa ábyrgd, og skal kunna vísa prógv um hetta. Góðkend útbúgving er sum minsta krav, at viðkomandi hevur luttikið á skeiði, sum er ella samsvarar við skeiðið *Svømmebadsteknik – første del*, sum Teknologisk Institut í Danmark skipar fyri.

4.3.2. Tá nýtt fólk verður sett sum ábyrgdarfólk, skal viðkomandi innan seks mánaðir eftir starvssetan hava nomið nevndu útbúgving. Nýggj ábyrgdarfólk skulu í byrjanini av starvssetanini hava upplæring í minst tríggjar mánaðir frá einum, sum hevur luttikið á skeiði samsvarandi *Svømmebadsteknik – første del*, kennir annleggið og hevur hollar royndir innan svimjihylstøkni og røkt.

4.3.3. Ábyrgdarfólk skulu javnan luttaka í viðkomandi skeiðum, sum m.a. Umhvørvisstovan skipar fyri.

4.3.4. Ábyrgdarhavandi skal hava eftirlit við:

- tí tekniska annlegginum,
- vatngóðskuni, soleiðis at dagligu skrásetingarnar verða gjørdar.

4.3.5. Ábyrgdarhavandi skal gera eina mannagongd fyri, hvussu farast skal fram, tá hyljar verða dálkaðir av skarni, spýggju ella blóði. Her verður víst til galdandi donsku vegleiðingina um handfaring av slíkum óhappum[3]. Mannagongdin skal vera tøk hjá starvsfólkunum í svimjihøllini. Umhvørvisstovan skal til eina og hvørja tíð kunna biðja um at síggja hesa mannagongd.

4.3.6. Ábyrgdarhavandi skal tryggja, at vegleiðing fyri rakstur og viðlíkahald av teimum teknisku skipanunum altíð er til staðar og kend av viðkomandi starvsfólkum.

4.3.7. Ábyrgdarhavandi hevur ábyrgd av, at logbókin verður útfylt rætt, og at sýni verða send til kanningar.

[3] Kapittul 17 í Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020

## 4.4. Innrætting av skiftingarrúmum, brúsurúmum, gongdum og hyljum

4.4.1. Í skiftingarrúmum, brúsurúmum og møguligum vesum skulu baðireglur heingjast upp, har m.a. upplýst verður, hvussu fólk skulu vaska sær, áðrenn farið verður í hyljarnar. Í galdandi donsku vegleiðingini er dømi um baðireglur[4]. Baðireglurnar skulu vera á sjónligum staði og kunna lesast í minsta lagi 3 metrar burturfrá.

4.4.2. Sápa skal vera tøk í brúsurúmunum.

4.4.3. Øki, har fólk ganga berføtt, og øki, har fólk ganga í skóm, skulu vera týðiliga atskild og merkt við skeltum.

4.4.4. Hyljar og aðrir hentleikar, sum verða nýttir av teimum vitjandi, skulu vera gjørdir úr tilfari, sum tolir vatn og er lætt at halda reint.

4.4.5. Atgongd til brúsurúm og vesi skal vera í nánd av hyljaøkinum.

## 4.5. Innrætting og rakstur av reinsiskipanum

4.5.1. Tekniska reinsiskipanin til hitapottarnar skal rekast í samsvari við galdandi reglur fyri svimjihyljar. Í løtuni eru galdandi reglur m.a. hesar:

- Góðskukrøv til Svimjihyljar, Reglugerð um góðskukrøv til svimjihyljar, 2016
- Bekendtgørelse om svømmebadsanlæg m.v. og disses vandkvalitet (BEK nr 918 af 27/06/2016)
- Norm for Svømmebadsanlæg (DS 477), Dansk Standard 2013
- Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020

4.5.2. Ein teknisk vegleiðing fyri reinsiskipanirnar skal altíð verða til staðar. Vegleiðingin skal m.a. innihalda tekningar, flowdiagram, vanlig rakstrarvirðir og mannagongdir fyri returskoling, eftirlit, steðging og fylling/tøming.

Vegleiðingin skal vera lætt atkomilig og dagførd eftir tørvi.

Viðkomandi starvsfólk skulu fáa upplæring í at brúka vegleiðingina.

Tekniska vegleiðingin skal fyriliggja í seinasta lagi seks mánaðir eftir, at henda góðkenning er givin.

4.5.3. Øll sandfiltrini skulu, sambært DS 477, hava botndysur.

4.5.4. Skipanin skal hava flowmetur og trýstmátarar til at kanna vatnsirkulatiónina í skipanini.

4.5.5. Sandfiltrini skulu returskolast í minsta lagi eina ferð um vikuna. Kolfiltrini skulu viðlíkahaldast samsvarandi vegleiðingini frá framleiðaranum, og skiftast ella endurnýggjast, tá adsorptionsevnini eru uppbrúkt.

[4] Kapittul 9 í Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020

4.5.6. Allir gestir skulu úr hitapottunum umgangandi, um:

- Sirkulatiónspumpan steðgar.
- Filtrini ikki rigga sum tey skulu.
- Feilir eru við kemikaliuskipanini ella tí automatisku stýringini av kemikalium.
- Vatngóðskan liggur uttan fyri tey absoluttu markvirðini, sum eru nevnd í 4.2.22.

4.5.7. Um hitapottarnir verða stongdir vegna eina ella fleiri av orsøkunum, ið eru nevndar omanfyri, kunnu hitapottarnir ikki opnast aftur fyri gestum fyrr enn viðurskiftini eru komin í rættlag aftur og vatnið hevur sirkulerað ígjøgnum filturskipanina í minsta lagi tvær ferðir umferðartíðina, meðan vatngóðskan hevur hildið øll markvirði.

4.5.8. Krav til umferðartíðina[5] og tann sirkuleraða vatnstreymin í hitapottunum eru sett sambært talvuni niðanfyri:

| | Omsætningstid* v/bassindybde | | | Cirkulerende vandstrøm pr. badende** målt som m³/time/person, der benytter bassinet indenfor 1 time |
|---|---|---|---|---|
| Bassintemperatur | ≤ 0,5 m | > 0,5 - < 1,5 m | ≥ 1,5 m | |
| ≤ 29 °C | 0,4 time | 2 timer | 5 timer | 2,0 |
| > 29 - ≤ 34 °C | 0,3 time | 1 time | 2,5 timer | 2,5 |
| > 34 °C | 0,3 time | 0,5 time | 1,25 timer | 3,0 |
| Spabade uanset temperatur | 0,1 time | | | 3,0 |

*Omsætningstiden er den maksimale tid, som det teoretisk tager, før hele vandmængden i bassinet har passeret vandbehandlingsanlægget én gang
**Disse krav skal være opfyldt samtidig med overholdelse af kravet til maksimal omsætningstid

4.5.9. Av heilsuávum, eigur hitin í vatninum ongantíð at fara upp um 40 °C.

4.5.10. Til at kanna, at blandingin í hitapottunum er nøktandi, skal ein litroynd gerast fyri hvønn hitapott. Tíðin, tað tekur at lita alt vatnið í hvørjum hitapotti, skal vera samsvarandi galdandi donsku vegleiðingini[6]. Frágreiðing frá litroyndunum skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at henda góðkenning er givin. Um litroyndin vísir, at vatnsirkulatiónin ikki er nøktandi, skulu neyðug tiltøk setast í verk beinanvegin. Litroynd skal síðani gerast í minsta lagi fimta hvørt ár.

[5] Umferðartíðin er tann tíðin í tímum, tað teoretiskt tekur, áðrenn vatnið í hylinum er farið ígjøgnum filtrini eina ferð.

[6] Kapittul 3.3.4 í Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020

## 4.6. Kemikalii – goymsla og nýtsla

4.6.1. Bert kemikalii, sum eru góðkend til nýtslu í svimjihyljum, kunnu nýtast. Sí galdandi donsku vegleiðing um, hvørji kemikaliir vanliga verða nýtt.[7]

4.6.2. Kemikalii, so sum klor, sýra og lútur skulu vera í hóskandi kemikaliirúmum við hóskandi luftskifti. Rúmini mugu ikki verða nýtt til annað enn til goymslu av kemikalium.

4.6.3. Sýru- og basuloysingar mugu ikki standa saman.

4.6.4. Sýrur og klor (hypoklorit) skulu – bæði við goymslu og kemikaliidosering – goymast hvør sær.

4.6.5. Mátingar av pH og fríum klori skulu vera automatiskar.

4.6.6. Deilstreymspumpurnar til klor, sýru og flokkingarevni skulu steðga automatiskt um sirkulatiónspumpan steðgar.

4.6.7. Sóttreinsing, stilling av pH og flokkingarevni skulu verða tilsett automatiskt.

4.6.8. Dagtangi skal nýtast til kemikalii, sum verða latin í baðvatnið. Dagtangin skal ikki rúma meira enn tað, sum í mesta lagi skal brúkast ígjøgnum ein dag.

4.6.9. Møguligir lekar og spill skulu kunnu haldast aftur í t.d. savningarbrunni, bakka ella við at hava ein stoyptan kant, ið rúmar innihaldinum í størsta ílatinum.

4.6.10. Kemikalii skulu altíð goymast á einum læstum, tryggum staði, har børn ikki sleppa at.

## 4.7. Reingerðarkrøv

4.7.1. Ein reingerðarætlan skal fyriliggja. Ætlanin skal innihalda upplýsingar um tey ymisku økini í høllini, reingerðarevni og tíðir fyri reingerð. Í reingerðarætlanini skal standa, at reingerðarvatn ikki má leiðast í hyljarnar. Víst verður til galdandi donsku vegleiðing um, hvussu hetta skal gerast[8]. Umhvørvisstovan kann biðja um at síggja reingerðarætlanina.

4.7.2. Hyljarnir, rennur rundan um pottarnar, bassinveggir og aðrir viðkomandi partar skulu reinsast regluliga og eftir tørvi í samsvari við reingerðarætlanina.

4.7.3. Reingerðarevni, sum í sambandi við baðvatnið kunnu elva til eitrandi sambindingar, so sum klorgass, mugu ikki nýtast nærhendis hitapottunum.

---

[7] Kapittul 6 í Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020

[8] Kapittul 8 í Vejledning om kontrol med svømmebade, Miljøstyrelsen, 2020

## 4.8. Burturkast

4.8.1. Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

4.8.2. Alt burturkast skal skiljast og handfarast í samsvari við galdandi reglum hjá móttakaranum.

4.8.3. Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum og ikki vera til ampa ella elva til dálking.

4.8.4. Spill av kemikalium skal beinanvegin takast upp og burturbeinast í samsvari við tær til eina og hvørja tíð galdandi reglur.

# 5. Fylgiskjal 1: Vælveruøkið við svimjihøllina í Leirvík

Vælveruøkið er knýtt at verandi svimjihøll í Leirvík. Atkoman verður frá verandi svimjihøllini, og verandi skiftingarrúm og brúsurúm verða nýtt.

**Hentleikar í vælveruøkinum**

Vælveruøkið umfatar:

- tveir hitapottar,
- ein kaldan pott,
- dampbað,
- sauna.

**Reinsiskipan**

Hvør hitapottur hevur sína egnu reinsiskipan við sandfiltri, kolfiltri, sirkulatiónspumpu, automatiskari kemikaliidosering og áhaldandi máting av pH og fríum klori.

Kaldi potturin hevur støðuga gjøgnumrenning av nýggjum vatni og hevur ikki reinsiskipan.

**Tøkniúm og kemikaliirúm**

Reinsiskipanin er staðsett í nýggjum tøknirúmi undir jørð.

Kemikalii verða goymd í tveimum atskildum kemikaliirúmum, einum til klor og einum til sýru.

Kemikaliirúmini eru útgjørd við ventilatión og aðrari neyðugari trygdarútgerð.

**Kloakkviðurskifti**

Nýggj kloakk er gjørd til tøming og returskoling frá reinsiskipanini.


24
23
22
20
19
17
16
15
14
13
12
11
10
9